FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ
Ministry of Finance

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
Postboks 208
110 Tórshavn

Tórshavn, tann: 3. september 2021
J. nr.: 21/16759
Viðgjørt: AE

Svar til fyrispurning nr. 52-024/2021 frá Jóhannis Joensen, løgtingsmanni, settur Jørgeni Niclasen, landsstýrismanni í fíggjarmálum, um rørslutarnað og Bygdaleiðir

Fyrispurningurin er soljóðandi:

1. Eru allir bussarnir hjá Bygdaleiðum í dag útgjørdir við lyftu, soleiðis at fólk við koyristóli kunnu brúka almenna busskoyring á øllum leiðum?

2. Eru bussteðgistøðini, har bussarnir hjá Bygdaleiðum steðga, gjørd klár til at m.a. koyristólar kunnu koyra úr og í bussarnar?

Svar til fyrispunring nr. 1
Strandferðslan hevur sum høvuðsendamál at veita trygt og gott ferðasamband hjá øllum borgarum um alt landið.

Bussarnir hjá Bygdaleiðum, 48 í tali, eru allir nýggir. Teir eru rúmligir, komfortablir, og hava allir lyftu, soleiðis at ferðafólk í koyristóli kunnu brúka bussarnar. Tað er at gleðast um, at ferðafólk í koyristóli hava tikið hesa loysn til sín og dagliga ferðast við Bygdaleiðum.

Svar til fyrispunring nr. 2
Umstøðurnar á bussteðgiplássum við landsvegir og kommunalar vegir skulu verða í lagi, soleiðis at tað er høgligt hjá fólk í koyristóli at fara í og úr bussunum. Ongar forðingar skulu verða fyri at brúka bussarnar. Nyðugt verður gera tillagingar á fleiri bussteðgiplássum.

Landsstýrismaðurin hevur heitt á Strandfaraskip landsins og Landsverk, um at kanna umstøðurnar, og gera eina ætlan fyri hvussu bussteðgiplássini kunnu betrast við landsvegir. Ein stórur partur av vegakervinum er kommunalur, og er neyðugt at kommunurnar luttaka í arbeiðinum.

Tinganes, 3. september 2021

Jørgen Niclasen
landsstýrismaður í fíggjarmálum